SKALDSKAPUR

# MARJUN VIÐ PERSÓNLIGARI SKALDSØGU

**Marjun Syderbø Kjelnæs hevur skrivað nýggja skaldsøgu, sum viðger eitt av heitastu málunum í heimspolitikki. Søgan er persónlig, og hetta er fyrstu ferð, at hon skrivar prosa við beinleiðis íblástri úr egnum lívi**



***Marjun Syderbø Kjelnæs hevur skrivað skaldsøgu við íblástri úr egnum upplivingum og tonkum***

**Eitt blóðugt stríð,** sum hevur kostað túsundatals mannalív. Avgjørdar meiningar og ósemjur um orsøk, gongd og avleiðingar. Og ein ung genta og ein vaksin kvinna, sum hugsa og hugleiða um støðuna.

Hetta er nakað av tí, sum nýggja skaldsøgan *Marta Marta* snýr seg um.

Marjun Syderbø Kjelnæs hevur skrivað bókina, og fyri fyrstu ferð hevur hon brúkt egnar upplivingar í einari skaldsøgu.

Forlagið Ungu Føroyar, sum hevur givið bókina út, sigur soleiðis um hana:

»Sum nítjan ára gomul fór Marta í kibbuts í Jordandalinum. Árið var 1993 og hon setti sær fyri, at gera sær stríð av sínum sansaðu upplivingum, mitt í einum politiskum og átrúnaðarligum brennidepli. Nú ein ísraelsk vinkona kemur til Føroya at vitja hana tretivu ár seinni, er tað heilaga landið meira enn nakrantíð eitt opið sár. Men hví ber ikki til at hyggja at tí, sum tað er? spyr Marta.

Marta í Nýggja testamenti fekk at vita, at hon skuldi ikki gera sær óneyðugt stríð, men velja hin góða lut. Marta í skaldsøguni spyr, hvat hin góði lutur er í einum trongskygdum heimi fullum av órættvísi?«

**Marjun Syderbø Kjelnæs** er virkin rithøvundur, sum debuteraði í 2004. Hon hevur skrivað leikrit, yrkingar, sangtekstir, stuttsøgur og skaldsøgur. Fyrsta skaldsøgan fyri vaksin var *Óendaliga vera*, sum kom út í 2016. Nú kemur *Maria Maria*, sum er trettanda bókaútgáva hennara. Marjun er MA í føroyskum bókmentum og máli, umframt at hon útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur.

Í útvarpssendingini Vindaga, sum var send í summar, tosaði Marjun Syderbø Kjelnæs um nýggju bókina, sum var á veg, og tá segði hon eitt nú:

– Søgan verður lýst við røddini hjá einari 19 ára gamlari gentu, sum við sunnudagsskúlaviðføri í skjáttuni fer í kittutz í Ísrael. Søgan verður eisini lýst av einari 49 ára gamlari kvinnu, sum nú 30 ár seinni eygleiðir allar grimdargerðirnar, hvørjar ávirkan tær hava, og hvørjar frásagnir birtast burtur úr teimum.

– Hetta er fyrstu ferð, at royni at skriva prosa við beinleðis íblástri úr mínum egna lívi.




**Á heimasíðuni hjá** Ungu Føroyum hava tvey fólk, ið hava lisið bókina áðrenn útgávu, sagt sína hugsan um hana.

Gudfrøðingurin Poul F. Guttesen sigur soleiðis:

»Eg eri rivin við, tá Marta ferðast millum ungdómsdagarnar í kibbutsini Gesher og syrgiligu støðuna í Miðeystri í dag. Drigin inn, verði eg órógvaður, noyddur at taka støðu – ikki minst til lagnuna hjá palestinum, ið liggur handan so nógvar dreymar um Lovaða landið. Og sum ein, ið enn trýr á son timburmansins, bjóðar Marta mær av, tá ið hon lýsir tingini, sum tey eru, heldur enn sum vit ynskja tey at vera.«

Journalisturin Brynhild Thomsen sigur soleiðis:

»Við skaldsøguni *Marta, Marta* skeinkir Marjun Syderbø Kjelnæs okkum ein svalandi vatnsopa í oyðimørkini av grunnum herrópum um Miðeystur. Við stórari innliving leggur hon verðina fyri okkum, har fólk úr øllum heraðshornum noyðast ella hava valt at liva saman. Ung sum eldri, ið plágast av ringari samvitsku um ikki at hava tikið skjóta og avgjørda støðu til kríggið, eiga at lesa hana. „Lat okkum í minsta lagi látast at vera djørv", stendur fremst, og Marjun Syderbø Kjelnæs prógvar aftur, at hon er ein av okkara allarfremstu rithøvundum.«

Bókin *Marta Marta* fæst í bókabúðum.